Føroya Studentaskúli og HF-skeið

# Vilt tú undirvísa í Hoydølum?

Treytað av góðkendum undirvísingarvirksemi verða frá 1. august 2011 at rokna **5-8 føst størv** leys at søkja sum adjunktur/lektorur við faksamanseting ætlað til lærugreinaraðið í studentaskúlum og HF-skeiðum. Søkt verður eftir lærarum við eini samanseting av hesum lærugreinum:

**Alis-evnafrøði, evnafrøði, danskt, enskt, føroyskt, ítróttur, lívfrøði, religión, spanskt, støddfrøði, søga, teldufrøði og týskt.**

Harumframt eru **12-16 ársvikariat og/ella tímalærarastørv** í lærugreinunum:

**Alisfrøði, alis-evnafrøði, danskt, enskt, fornaldarfrøði, franskt, føroyskt, leiklist, religión, sálarfrøði, spanskt, støddfrøði, søga, teldufrøði, tónleikur og týskt.**

Ársvikariat kunnu eisini søkjast í hesum lærugreinum saman við eini av lærugreinunum, sum nevndar eru undir føstu størvunum.

Nærri upplýsingar um størvini, førleikakrøv og treytir í sambandi við umsóknir kunnu lesast á heimasíðu skúlans www.hoydalar.fo

Umsókn á oyðublaði frá MMR, YF ella GL verður stílað og send til

Føroya Studentaskúli og HF-skeið,
att.: Mikkjal N. Helmsdal, rektari,
Hoydalar,
Sanatoriivegur 1, FO – 188 Hoyvík,
Føroyar

Ella á teldupost:
mikkjal.helmsdal@skulin.fo

og skal vera skúlanum í hendi í seinasta lagi mánadagin 2. mai 2011.

Avrit av próvtøkuskjølum ella úrskrift úr próvtøkuprotokoll, CV og møgulig ummæli/viðmæli frá fyrri starvssetanum skulu sendast saman við umsóknini.

LISTASAVN FØROYA | P.O.BOX 1141 | FO110 TÓRSHAVN | TLF. +298 313579 | INFO@ART.FO | WWW.ART.FO





# Móttøka á Listasavni Føroya

Í sambandi við, at Helgi Fossádal leggur frá sær sum stjóri á Listasavni Føroya eftir at hava sitið sum stjóri í sjey ár, verður almenn móttøka á Listasavninum **fríggjadagin 29. apríl kl. 16-18.**

Á móttøkuni hevur danski listfrøðingurin dr.phil Mikael Wivel framløgu av nýggja stórverkinum SEKEL – føroysk myndlist í hundrað ár.

**Martin Næs, formaður**
**Listasavn Føroya**

ÚTBJÓÐING

## Tekniski skúli í Klaksvík, Skúlaheimið

Við hesum verður arbeiðið viðv. umvæling av útsíðum á Skúlaheiminum í Klaksvík boðið út í almenna lisitatión sum høvuðsarbeiðstøka.

Arbeiði fevnir í høvuðsheitum um endurnýggjan av útsíðum:
- Nýggja bjálving og klæðing av útsíðum, uppsett á stálgrind
- Nýggj vindeygu

Arbeiðið skal gerast í tíðarskeiðinum 06.06 – 15.09.2011 og í juli - august 2012.

Lisitatiónin verður mánadagin 23.05.2011, kl. 14.00 á Tekniska skúla í Klaksvík.

Útbjóðingartilfarið verður bert útflýggjað digitalt, og verður tað sent teimum bjóðandi 02.05.2011.

Bílegging av tilfari fer fram áðrenn 29.04.2011 við at senda teldupost til gugu@lv.fo.

Tá biðið verður um útbjóðingartilfar, skal upplýsast:

- Navn og bústaður á virki.
- Kontaktpersónur og telefonnummar.
- Teldupostadressa.
- Vinnutal.

SENDISTOVAN

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, 110 Tórshavn | Tel. 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*

*Landsverk er ein stovnur undir Innlendismálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.*

ÆTTLEIÐINGARFELAGIÐ



# FAMILJUDAGURIN 2011

Familjudagurin verður í ár hildin í skúlanum við Løgmannabreyt 30. apríl.

Skúlin hevur allar hentleikar fyri børnini, so sum spælipláss og stóra fimleikarhøll.

Eisini verður filmur og poppkorn til børnini.

Fyri tey vaksnu verður millum annað 2 fyrilestrar um ættleiðing.

Kostnaðurin er kr. 150,00 fyri 18 ár og eldri og ókeypis fyri øll undir 18 ár.

Tey sum ynska at luttaka, skulu senda teldupost til post@aettleiding.fo

Luttøkugjald skal rindast á kontu 6460 – 1693702.

Øll áhuga í ættleiðing eru hjartaliga vælkomin



W W W . A E T T L E I D I N G . F O